# Håkon Hamre

* 2. oktober 1914. † 26. desember 1972.



Norskir málfrøðingar hava, sum vituligt er, bæði í farnu øld og í okkara borið við føroyskt mál í ritgerðum sínum. Ymsastaðni í verkum sínum nevnir Sophus Bugge føroysk orðsnið, og í bók síni »Oplysninger om bygdemaalene i Hardanger« (Bergen 1885) hevur Chr. Vidsteen eitt »anhang om Færøisk«. Í 1903 kom Amund B. Larsen vestur um fjørð, og málsligt tilfar hiðani nýtti hann í ritgerðini: »Hvor længe fandtes der i oldnorsk former uten i-omlyd i 1. per. præs. sing. av stærke verber? Exkurs: De to nordiske tonelag i færösk« (Arkiv. för nord. filologi, 1909). Hann skrivaði eisini grein í hálendska tíðarritið Scandia (1904): »Om folk og sprogforhold på Færøerne«, sum er uppafturprentað í Maal og Minn 1949—50. Í 1907 kom Marius Hægstad higar, hann sum kom at

skriva høvuðsverkið um føroyskt mál, málsøguliga lýst: »Vestnorske Maalføre fyri 1350, II. Sudvestlandsk 2. Indre Sudvestlandsk, Færøymaal, Islandsk, Andre bolken; Videnskapsselskabets Skrifter, II. Hist.-filos. Klasse 1916, No. 4.« (Kristiania. 1917). Hinir menninir, sum eru at nevna í hesum sambandi eru teir, Mikjel Sørlie, Håkon Hamre og Reidar Djupedal. Høvuðsritgerðin hjá Mikjel Sørlie er tann hann skrivaði um lógbókina í Lund, »Færøysk tradisjon i norrønt mål« (Avhandlinger utg. av Det Norske Videnskaps-Akademi í Oslo, II. Hist.-Filos. Klasse 1936). Reidar Djupedal hevur skrivað bæði um mál og um menn (t. d. um V. U. Hammershaimb og J. C. Svabo). Eins og Marius Hægstad legði Håkon Hamre mestan dent á málsøguna.

Håkon Hamre var føddur í Bergen 2. oktober 1914 og doyði í Berkeley í California 26. desember 1972. Hann gjørdist cand. philol. úr Oslo í 1941, og hevði tá vitjað lærdómsháskúlar í Berlin, Reykjavík og Keypmannahavn. Høvuðsgrein hansara var norrøn málfrøði. Vestlendingur sum hann var leit hann vestur í hav eftir teimum málum, sum høvdu uppruna sín í fornvestlendskum, eftir føroyskum og íslendskum.

Frá æviskeið hansara skal eg nevna hetta: Hann var vísindaligur hjálparmaður og fyrilesari við Bergens Museum 1942—48, 1948—49 norskur lektari við Háskóla Íslands, amanuensis á Folkeminnesamlingen við Universitetið í Bergen 1949—52. Í 1952 flutti hann við húski sínum vestur um hav og búði í Berkeley til deyðadag sín. University of California í Berkeley hevði fingið deild við norðanmálum, sum svenski professarin Assar Janzén stóð fyri. Hesin sami fekk Håkon Hamre vestur sum »assistant professor« (1952—54), »associate professor« 1954 (til 1972). Tá ið Assar Janzén doyði í 1954, kom Håkon Hamre at vera eftirmaður hans sum »Chairman of the Scandinavian Department«. —

Vit báðir hittust á fyrsta sinni í 1939 í Reykjavík hjá vini okkara Einari Ól. Sveinssyni. Har var Håkon Hamre staddur nýgiftur maður við konu síni Kari (f. Shetelig), sum las bókmentasøgu. Hjúnini komu seinni sama ár til Keypmannahavnar, hann at lesa føroyskt, hon at skriva bók um Clemens Petersen. Hetta árið fekk hann drigið saman tilfarið til ritgerð sína »Færøymålet i tiden 1584—1750« (Skrifter utg. av Det Norske Videnskapsakademi i Oslo. II, Hist.-Filos. Klasse, 1944, Nr. 2). Í 1946 hittust vit aftur, minnist meg rætt fyrst í Keypmannahavn, men í hvussu er seinni her í Tórshavn, tá sat hann á bókasavninum her og skrivaði inngang og viðmerkingar til útgávuna av Tarnoviusi, »Ferøers Beskrifvelser av Thomas Tarnovius« (Færoensia 2, 1950).

Håkon Hamre fekk ikki fáar vinir hetta árið hann var í Føroyum. Aftan á at hann var fluttur vestur um hav var tað bert stakferðir vit hittust, men eg veit at honum dámdi væl í Berkeley, har hann livdi við seinnu konu síni Sigvor (f. Roneid; tey giftust 1952) og børnum sínum. Berkeley er so nær við San Francisco, og hagar komu so nógv norsk skip,

at hann kundi dagliga hitta norðmenn. Hann, haldi eg, hugsaði ongantíð um at flyta eystur aftur til Noregs, men í 1958—59 var hann har, og onkuntíð seinni við, til at gera rannsóknir. —

Aftur at teirri nevndu ritgerðini um føroyska málsøgu í tíðini 1584—1750 og útgávuni av Tarnoviusi verði eg at nevna hansara lítlu, men sera áhugaverdu ritgerð í Maal og Minne 1941: »Om u-omlyd av a i Færøysk«. Í Fróðskaparritum, 19. bók (1971) er, greinin »Some notes on Faroese Bird Names«. Í »Scandinavian Studies« (amerikanskt tíðarrit) skrivaði hann ymisk ummæli, og eina grein: »The Use of the Genitive in Modern Faroese« (1961).

*Chr. Matras.*